FYLGISKJAL 2

STARVSMANNAFELAGIÐ

Tórshavn 15.01.2021

Uttanríkis- og Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
100 Tórshavn

Hoyringsskriv frá Starvsmannafelagnum: Miðlastuðul

Starvsmannafelagið hevur fingið uppskot til løgtingslóg um broyting til løgtingslóg um miðlastuðul, tykkara skjal dagf. 04.01.2021, til ummælis.

Starvsmannafelagið hevur limir sum starvast í Kringvarpi Føroya sum journalistar og miðlafólk og sum ikki vera beinleiðis ávirkaðir av hesum uppskoti. Av tí, at felagið varðar av fjølmiðlum sum fakøkið og sum møguligt framtíðar starvsøkið hjá okkara limur skulu vit gera hesar viðmerkingar:

Yvirskipað tekur Starvsmannafelagið undir við, at miðlastuðul verður latin privatu fjølmiðlunum í Føroyum. Vit meta, at eitt fjølbroytt miðlalandslag, har privatir fjølmiðlar framleiða dygdargóðan kritiskan journalistikk í kapping við Kringvarp Føroya hevur avgerandi týdning fyri okkara fólkaræði, og at hetta ikki letur seg gera, uttan at privatu miðlarnir fáa almennan stuðul.

Vit halda, at hugskotið at stuðla verkætlanum er gott sum, tí tað gevur privatu fjølmiðlunum møguleika at fordjúpa seg í journalistiskum evnum. Vit halda tó ikki, at hesin leisturin eigur at koma *í staðin* fyri verandi skipan við rakstrarstuðli, men heldur eigur at koma afturat.

Stuðul til privatar fjølmiðlar, sum bera tíðindi og gera journalistikk hevur verið nýttur í norðurlendsku grannalondunum í nógv ár fyri at tryggja kapping við alment fíggjaðu miðlarnar og fyri, at tryggja, at smærri fjølmiðlar hava møguleika at virka kring landið. Tað hevur vist seg, at hesin stuðul hevur havt stóran týdning fyri fjølbroytnið í fjølmiðlalandslagnum og fyri geografisku spaðingina, sum hevur týdning fyri útjaðaran.

Rakstrarstuðulin, sum hevur verið latin til føroysku fjølmiðlarnar hevur tó verið alt ov avmarkaður. Játtanin hevur ligið um 2 milliónir krónur árliga. Og skuldi hon staðið í lutfalli við stuðulin í Danmark, skuldi upphæddin – sambært fakfólkum í fjølmiðlunum (sí t.d. greinina "Frá nøkrum til einki" í Dimmu 9. januar 2021) – í minsta lagi verið tað tvífalda.

Í Føroyum er eisini tað harmiliga hent, at postgjøldini vórðu hækkaði eftir at fjølmiðlastuðulin kom, so at hann ikki fekk tað gagnliga árinið, sum varð ætlað. Fakfólk á føroysku bløðunum, sum Starvsmannafelagið hevur verið í samband við meta, at skal stuðulin til privatu miðlarnar gera veruligan mun, skuldi hann av røttum ligið um 8-10 milliónur krónur.

Vit halda, at tað hevur týdning, at fjølmiðlarnir framhaldandi fáa almennan stuðul til raksturin, og at hendan játtanin, ið hvussu so er ikki má vera minni enn í dag. Afturat hesum kann so tann nýggja skipanin við verkætlanarstuðli verða sett á stovn, har privatir miðlar kunnu søkja um játtan til gravandi journalistikk, sum er meira orkukrevjandi. Hendan skipan kann geva fjølmiðlunum møguleika, t.d. at seta fólk eina tíð, at fordjúpa seg í ávísum journalistum evnum av samfelagsligum týdningi; tó uttan at hetta gongur út yvir tað vanliga redaktionella virksemið, sum framhaldi má verða stuðlað.

Verður rakstarstuðulin tikin av og erstattaður við verkætlanarstuðlinum, bera vit ótta fyri, at tað fer at skaða privatu fjølmiðlarnar; kanska serliga teir smæstu, sum ikki hava møguleika at søkja um stuðul til verkætlanin fleiri ferðir um árið og tí helst fara at vikna enn meira.

Starvsmannafelagið mælir tískil til at verkætlanarstuðulin til privatu fjølmiðlarnar kemur **aftrat** verandi stuðulskipan, og at samlaða játtanin hækkar, so at hon samanlagt kemur á sama stig sum í okkara grannalondum.

J. H. Schrøtersgøta 9 • Postsmoga 165 • FR-110 Tórshavn • Tlf. 298 614868 • Fax 298 311092 •
t-post: starvsmannafelag@starvsmannafelag.fo • Heimasíða: www.starvsmannafelag.fo

Um somu tíð mæla vit til at verandi útberingarskipan verður eftirkannað fyri at vita, um tað ikki ber til at tryggja, at rakstrarstuðul sum verður latin ikki bara fer til hækkaði postútberingargjøld.

Við tað, at Miðlastuðulsnevndin skal taka støðu til verkætlaninar, verða innihaldsligar avgerðir, sum vanliga hoyra til óheftar tíðindaredaktiónir, fluttar til nevndina. Skal hetta vera forsvarligt, er tað alt avgerðandi, at nevndin er mannað av fakfólki, og at prinsippið um armslong frá politisku skipanini verður tryggjað væl og virðiliga.

Tað framgongur, at landsstýrismaðurin fær heimild at áseta nærri treytir og reglur fyri stuðlinum. Vit mæla til, at høvuðsendamálið við miðslastuðulslógini framgongur av kunngerðini, nevnliga, at stuðulin skal latast *tíðindamiðlum, hvørt redaktionella innihald í stóran mun er kritiskur journalistikkur og sjálvstøðug kritisk viðgerð av aktuellum føroyskum samfelagsviðurskiftum og altjóða viðurskiftum úr einum føroyskum sjónarhorni*, sb. almennu viðmerkingarnar til løgtingslógina um miðlastuðul.

Vinarliga

Súni Selfoss, formaður
Starvsmannafelagið